## Hjálpti at gera viðmerkingar

**Suðuroyarsiglingin:** Í farnu viku var freistin úti at koma við viðmerkingum til nýggju ferðaætlanina hjá Strandferðsluni.

Millum tey sum komu við viðmerkingum vóru fólk úr Suður-oy, sum so inniliga ynsktu at Strandferðslan broytti fráfaringartíðirnar úr Havnini eitt sindur.

Hetta var serliga galdandi fyri morguntúrin suður týsdagar. Tey ynsktu, at Strandferðslan legði fleiri túrar kl. 12:30. Hetta gav nú eisini úrslit hjá suðuroyingum.

Tá tann nýggja ferðaætlanin kemur í gildi um mánaðar-skiftið fer Smyril at sigla tríggjar ferðir um vikuna kl. 12:30 og nú bert tvær ferðir kl. 10:15. Við øðrum orðum hevur Strandferðslan flutt túrin týsdag tveir tímar fram, til middagsleitið, tí hetta tóktist vera eitt stórt ynski frá suðuroyingum.

Av Strandferðsluni verður tó upplýst, at túrarnir av Havnini leygarmorgun og sunnumorgun fara at verða somu tíð sum higartil, nevniliga kl. 10:15.

**sb.**

## Stuðla høllini við treytum

**Oyrarbakki:** Felagskommunan í Sundalagnum er í høvuðsheitum við í ætlanini um eina fótboltshøll í Skálafirði.

Men kommunan setur tó eina treyt við hesum, og tað er at allar kommunurnar í ætlanini verða við tá til stykkis kemur.

Bygdaráðið hevði fund mánakvøldið, tá henda fótbóltshøllin var eitt av málunum á skránni. Talan er her um at kommunur í Eysturoynni, saman við Klaksvíkar kommunu byggja eina innandura fótbóltshøll í Skálafirði. Soleiðis sum støðan er í løtuni, skal Sunda kommuna gjalda 1,8 mió. kr., -um ætlanin altso verður til veruleika einaferð í framtíðini.

Bygdaráðið samtykti nevniliga, at teir eru við í ætlanini um allar kommunurnar, sum eru nevndar í uppritinum eru við. Tí ger kommunan ikki nakrar fíggjarligar bindingar í framtíðini.

**sb.**



*Vestmanna kirkja verður ikki at kenna aftur, tá hon um stutta tíð verður tikin í nýtslu aftur – nakað seinni enn ætlað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sleppa ikki í kirkjuna á páskum

**Vestmanna kirkju verður í hesum døgum bæði útbygd og umvæld. Ætlanin var at arbeiðið skuldi verða liðugt á páskum í ár, men so verður ikki**

KIRKJUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** Tað tekur ofta longri tíð enn væntað, tá ein fer í holt við at umvæla gomul ting.

Hetta hevur kirkjuráðið í Vestmanna fingið at sanna, nú kirkjan í bygdini bæði er umvæld og útbygd. Arbeiðið skuldi vera liðugt um eina viku, men enn restar nakað í, til kirkjufólkið aftur sleppur í ta broyttu kirkjuna.

- Vit høvdu ætlað at havt fyrstu gudstænastuna aftur á páskum. Men ymisk eyka arbeiðir hava longt arbeiðstíðina nakað, sigur Bjarni Heinesen, formaður í kirkjuráðnum við Sosialin. Miðað verður nú eftir, at hetta ístaðin verður á hvítusunnu.

Kirkjuráðið tók í fjør avgerð um, at byggja kirkjuna út, samstundis sum tann gamli parturin av kirkjuni skuldu fáa eina neyðuga umvæling.

Sum skilst á formanninum var hetta eisini í tøkum tíma, tí undir arbeiðinum eru menn komnir fram til, at rot var farið at gera rættiliga nógv um seg í kirkjutorninum.

Annars eru nógv arbeiði gjørd bæði innan og uttan í hesi kirkjuni, sum stavar heilt aftur frá 1895.

### Í tøkum tíma

Arbeiðið við Vestmanna kirkju hevur sum nevnt verið í tveimum: Teir hava framt neyðugar umvælingar, eins og kirkjan er longd við størri forkirkju og nýggjum torni.

Tá avgerðin upprunaliga varð tikin var ikki ætlanin, at nakað skuldi gerast við gólvið inni í kirkjuni. Men semja fekst tó skjótt um, at her var neyðugt við ábót, tí bjálvingin ikki var nóg góð.

Og tá teir so av álvara fóru undir at fyrireika hetta arbeiðið komu teir fram á, at bjálkarnir út móti vegnum máttu somuleiðis skiftast út. Í sama viðfangi varð avgerð tikin um at leggja flisar á og hita í gólvið.

Ein onnur rættiliga stór broyting inni í kirkjuni er, at hválvið er tikið burtur. Hetta hválvið sum ímyndaði ein stjørnufyltan himmal er nú avloyst av einum opnum tróðri.

- Men fyri at halda fast við ímyndina av stjørnuhimmalinum hava vit ístaðin sett upp smáar lampur, sum mynda stjørnurnar, sigur Bjarni.

### Nýggja altartalvu

Av lutunum í kirkjuni kann nevnast, at í torninum fara nú at hanga tvær klokkur: Tann verandi klokkan frá 1976 umframt hana frá 1794, sum er úr gomlu kirkjuni.

- Okkara ætlan er, at tær báðar skulu kunnu ringja, sigur formaðurin í kirkjuráðnum.

Hinvegin so tók tað eitt sindur longri enn væntað, við at fáa altartalvuna til vega. Tá fyrireikingarnar til arbeiðið byrjaðu, fingu tey lovað altartalvuna, sum fólk í Meinigheitshúsinum í Havn hava kunnað glett seg um í mong ár.

Men seinni varð lyftið tikið aftur til hesa vøkru og stórslignu myndina, sum Svend Havstein Mikkelsen málaði á sinni, tí hon skal upp at hanga í nýggju kirkjuni, sum nú verður fyrireikað í Hoyvík.

Tann gamla altartalvan í Vestmanna var rættiliga illa farin og kundi ikki setast uppaftur, og tí var neyðugt at heita á listakvinnuna Astrid Andreassen at gera eina nýggja altartalvu. Hetta arbeiðið er í løtuni í gerð.

# McFadden toppar í Føroyum

**Brian McFadden eigur tann best umtókta sangin á 15 teimum bestu hesa vikuna. Írski sangarin vitjar í august mánaði í Føroyum**

TÓNLEIKUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Brian McFadden eigur best umtókta sangin á 15 teimum bestu í løtuni. Í summar kann hann hoyrast live á Summar Festivalinum í Klaksvík*

Brian McFadden er eitt heitt navn í nógvum europeiskum londum í løtuni. Fyrrverandi sangarin í Westlife hevur havt rættiligan vind í seglunum, síðani hann kom við sínari fyrstu solofløgu.

Í hesum døgum eigur Brian McFadden tann best umtókta sangin á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpinum. Tað eru serliga ungfólk, sum atkvøða á hesum lista, og hesa vikuna er McFadden á toppinum við sanginum Almost Here.

Hetta er ein sangur, sum McFadden hevur skrivað, og sum hann syngur saman við unnustu sínari, Delta Goodrem. Tann vakri og inniligi sangurin er væl umtókur í fleiri europeisk-um londum og liggur í løtuni ovarlaga bæði í Bretlandi, Írlandi og Danmark.

### McFadden vitjar í Føroyum

Í summar verður møguleiki at hoyra Brian McFadden syngja live á føroyskum palli. Tað verður á Summar Festivalinum í Klaksvík, sum verður hildin fyrst í august mánaði.

Brian McFadden kemur til Føroya saman við bólkinum hjá sær, og hann verður eitt av høvuðsnøvnunum á tónleikafestivalinum í Klaksvík.

Forsølan til festivalin er byrjað, og hóast tað eru fleiri mánaðir til tiltakið verður, eru longu fleiri hundrað vikuskiftispass seld í forsølu. Prísurin er serliga góður fyrstu tíðina, men talið á passum, sum verða seld við stórum avsláttri, er avmarkað, og eftir 1. juni hækkar prísurin. Forsølan er á Shell-støðunum kring landið.